## Pensjónistur smuglaði hassj

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Mánamorgunin tá Norrøna legði at bryggju í Havn, stóðu tollararnir klárir at kanna ferðafólkið, sum kom úr Danmark. Og teir høvdu eydnuna við sær.

Ein eldri maður, sum nærkast pensjónsaldri, varð tikin við 19 grammum av hassji uppi á sær.

Hetta er heldur meira enn vanligt, sigur løgreglan, tí vanliga smugla fólk bara heilt fá gramm í senn. Eitt gramm av hassji kostar ímillum 100 og 125 krónur. Henda nøgdin hevur tí-skil eitt virði uppá góðar 2000 krónur.

Maðurin kann vænta sær eina bót fyri at hava roynt at smugla ólóglig rúsandi evni til Føroyar.

Annars hevur hetta verið eitt heldur friðarligt vikuskifti, hvat herverki viðvíkur. Tríggir mans hava verið og sovið rúsin av sær á støðini, og ein førari varð sunnudagin tikin fyri at koyra við kenning.

## Tvey innbrot í Vági

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Tvey innbrot hava verið í Vági hetta vikuskiftið. Tað eru Shell støðin á Bakka og krambúðin á Gørðunum, sum hava havt óbodnar gestir.

Leygarnáttina klokkan tvey á nátt varð eitt innbrot fráboðað løgregluni. Tað var á Shell støðini. Gerningsmenninir høvdu sloppið sær inn gjøgnum eina garaguhurð, sum teir høvdu trýst upp.

Tjóvarnir sluppu avstað við vekslipeningi, sum taldi 1000 krónur.

Eitt annað innbrot hevur eisini verið í Vági um vikuskiftið, og tað var í krambúðini á Gørðunum. Hetta innbrotið varð fráboðað mánamorgunin, og løgreglan fór at kanna málið nærri.

## 5-mannafar fekk motorsteðg

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Hóskvøldið klokkan 23.10 fekk MRCC-støðin í Havn fráboðan frá løgregluni á Sandoy um, at eitt 5-mannafar við einum persóni umborð var horvið. Umborð var ein 78-ára gamal maður, sum var farin eftir nátum eystanfyri Skálhøvda hósdagin seinnapart.

Maðurin var ikki afturkomin, tá myrkrið legðist, og tí fór tyrlan hjá sjóverjuni at leita. Samstundis fóru Brimil og Tjaldrið eisini at leita.

Tað var tó Blikur, ið fyrst fekk eygað á 5-mannafarið 4 sjómíl eystanfyri Dalsnípuna. Hetta var klokkan eitt á nátt.

Motorurin á bátinum var steðgaður, og tá einki radiosamband var umborð, hevði maðurin ikki havt møguleika at senda neyðarkall. Síðani kom Brimil til bátin, sum varð tikin inn á Húsavík.

# Leita framvegis eftir Óla Dam



*70 ára gamli Óli Dam hvarv á bryggjuni í Kollafirði hóskvøldið, og hann er enn ikki funnin. Her gera froskmenn seg tilreiðar at fara undir leitingina*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Maðurin, sum hvarv í Kollafirði hóskvøldið, er framvegis ikki komin undan kavi, hóast leitað hevur verið av øllum alvi**

LEITING
*Stefan í Skorini*

Leitað verður framvegis eftir Óla Dam, sum hvarv í Kollafirði hóskvøldið. Tá vit tosaðu við løgregluna mánamorgunin, høvdu menn enn ikki borið eyga við mannin.

Vaktar- og Bjargingartænastan hevur saman við fólki av Brandstøðini og frá Havnar og Kollafjarðar Bjargingarfelag leitað eftir manninum síðan hósdagin, tá fólk fingu frænir av, at hann var horvin.

Harumframt hava Tjaldrið og Brimil verið á firðinum og leita við sjókaga, men uttan úrslit. Farið varð aftur undir leitingina mánamorgunin klokkan 10. Tá skuldi seinasti parturin av fjørðinum kannast við sjókaganum.

Tað var hóskvøldið klokkan seks, at Óli seinast var sæddur á lívi. Hann var tá á veg at seta gørn við einum eldri 4-mannafari, sum hann hevur standandi í einum neysti í Kollafirði.

Men hann er ongantíð komin so langt. Gummistivlarnir standa enn órørdir í neystinum, og sjógvur er í bátinum. Tað ber boð um, at hann ikki hevur oyst sjógvin úr bátinum.

Umframt at leitað hevur verið á sjógvi hevur løgreglan eisini verið úti við hundunum. Teir hava verið í øllum neystunum í Kollafirði og í gilum og veitum, har maðurin kanska er dottin. Hundarnir hava ikki tevjað nakran mann enn, hóast leitað hevur verið í øllum hugsandi og óhugsandi støðum.

Óli Dam er 70 ára gamal. Hann er kollfirðingur men búsitandi í Havn. Enn er ikki avgjørt hvussu leingi menn fara at leita, men støða verður tikin til tess seinni.

# Risastórt hundaland

Børnini í Barnagarðinum undir Brúnni komu í síðstu viku fram á hetta risastóra hundalandið, sum liggur á borðinum.

Børnini funnu hundalandið, sum hevur eitt tvørmát uppá einar 30 sentimetrar. Hundalond eru sum heild eru rár í Føroyum, og tí er tað enn meira óvanligt at finna eitt, sum er so risastórt sum hetta.

Tað er nærum óhoyrt at finna so stór hundalond her á landi.





# Clickhaze í upptøkuhølunum

**Bólkurin Clickhaze húsast í hesum døgum í Lundgaard Studio í Danmark, har bólkurin hesa vikuna tekur upp saman við bretskum tøkningi. Bólkurin hevur eisini fingið góð sambond innan festivalheimin**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Clickhaze vann Prix Føroyar finaluna í ár og høvuðsvinningur var upptøka í donskum upptøkuhølum í eina viku.

Í gjár, mánadagin, byrjaðu Clickhaze upptøkurnar. Tær fara fram í Lundgaard Studio. Tøkningur undir upptøkunum er bretski David Hyatt, ið sigst vera sera dugnaligur.

### Alt goldið

Umframt at taka upp í Lundgaard Studio, eru eisini umstøður, so bólkurin kann búgva har.

Øll upptøkuætlanin er ókeypis fyri Clickhaze, tí hetta er nevniliga høvuðsvinningurin til Prix Føroyar kappingina, sum bólkurin vann. Alt er goldið og í hesum eru eisini roknaðar 3 máltíðir dagliga hesa vikuna, upptøkurnar fara fram. Tað er Mentamálastýrið, ið hevur latið høvuðsvinningin, tó verður eisini ein partur goldin av Norðurlandahúsinum.

Alla hesa vikuna fara limirnir í Clickhaze so at nýta í Lundgaard Studio. Júst hvat spyrst burturúr upptøkunum, er enn ikki heilt greitt, men í onkrum miðli hevur verið nevnt, at ein útgáva við Clickhaze kann væntast fyri jól.

Sosialurin hevur roynt at fingið samband við Clickhaze í upptøkuhølunum, men har er trupult at fáa svar. Hetta kundi bent á, at har longu er full ferð á upptøkunum.

### Góð sambond

Annað, ið Clickhaze fekk burturúr Prix kappingini, var luttøka á donskum festivali. Hetta gekk væl. Fróði Vestergaard, samskipari í Norðurlandahúsinum sigur, at Clickhaze nú hevur fingið samband við góðan festivalfyriskipara, so kanska okkurt eisini spyrst víðari burturúr á hesum økinum í næstu framtíð.



*Clickhaze húsast hesa vikuna í Lundgaard Studio í Danmark saman við bretskum tøkningi. Hetta er høvuðsvinningurin, sum bólkurin fekk, tá hann vann Prix Føroyar kappingina.*

*(Mynd. Dagfinn Olsen)*

Ársfundur hjá Unga Tjóðveldinum:

# Jóannes er nýggjur formaður

**Á ársfundi hjá Unga Tjóðveldinum um vikuskiftið varð Jóannes Vitalis Hansen valdur til nýggjan formann eftir Annlis Bjarkhamar**

FORMANSSKIFTI
*John Johannessen*

Jóannes Vitalis Hansen úr Havn er nýggjur formaður í Unga Tjóðveldinum.

Unga Tjóðveldið hevði um vikuskifið ársfund á Kambsdali, har millum annað nýggj nevnd varð vald. Og tá forkvinnan gjøgnum nógv ár, Annlis Bjarkhamar, ikki valdi at stilla upp aftur, skuldi eisini nýggjur formaður finnast.

Nýggja nevndin hjá Unga Tjóðveldinum hevur skipað seg við Jóannes Vitalis, sum formanni, Rúna Nielsen, sum næstformanni, Katrin Bech, sum skrivara, Jógvani Philbrow sum kassameistara og Jógvani Jacobsen sum talsmanni.

Ársfundur Unga Tjóðveldissins staðfesti, at einasta virðiliga støða fyri tjóðina er, at Føroya fólk skipar seg sum sjálvstøðugt lýðveldi.



*Jóannes Vitalis Hansen er nýggjur formaður í Unga Tjóðveldinum*


